## UTTAN ÚR HEIMI

### Flýggja undan gosi

Umleið 20.000 fólk eru flýdd úr bygdunum nærhendis indonesiska gosfjallinum Awu, sum hevur goyst øsku síðani eina ferð í síðstu viku.

Gosfjallið er á oynni Sangihe, sum er einar 1200 fjórðingar í landnyrðing úr høvuðsstaðnum Jakarta, og myndugleikarnir bera ótta fyri, at øskugosið kann enda við einum rættiligum gosi. Ein embætismaður segði í gjár, at fleiri smáir jarðskjálvtar hava verið í økinum við gosfjallið, og at alt bendir á, at fjallið fer at goysa. Enn er kortini eingin gosmynja komin úr opinum.

Awu er góðar 1.300 metrar høgt og tað mest virkna gosfjallið í Indonesia. Tað hevur goyst javnan síðani í 17. øld. Ringasta gosið var í 1812, tá næstan 3.000 fólk doyðu.

Ronald Reagan fer til gravar fríggjadagin. Sjálvt minningarhaldið verður í Washington, men Reagan verður jarðaður í Kalifornia.

Ríkis- og stjórnarleiðarar úr øllum heiminum fara til Washington at minnast Reagan, og tí eru trygdartiltøkini tey strangastu, sum hava verið í USA síðani dagarnar eftir yvirgangsatsóknina at New York og Washington tann 11. september í 2001. Teirra millum, sum fara at minnast Reagan, eru fyrrverandi sovjetski forsetin Mikhail Gorbatjov og fyrrverandi bretski forsætisráðharrin Margareth Thatcher.

Amerikonsku myndugleikarnir rokna við, at fólk í tíggjutúsundatali fara at taka lut í ymsum minnistiltøkum hesa vikuna. Eisini har eru myndugleikarnir á varðhaldi orsakað av vandanum fyri yvirgangsatsóknum.

### Bjartskygni í WTO

Forsetavalið í USA í heyst og komandi broytingar í ES-nevndini gera, at fólk hava fingið betri vónir um, at okkurt munagott fer at spyrjast burtur úr samráðingunum í WTO um fríhandil.

Í síðstu viku viðgjørdu embætismenn ymsar spurningar um landbúnaðarvørur, og sagt verður, at hýrurin var góður, og at fólk vóru meiri bjartskygd, enn tey hava verið. Men málið hevur skund. Eydnast tað ikki at fáa eina semju í summar, kann tað taka langa tíð, áðrenn eitt nýtt samráðingarumfar kann byrja, tí forsetavalið í USA og broytingar í ES-nevndini fara ikki at eggja til semjur, skrivar Aftenposten.

Umleið 20 lond við Brasil, Argentina, India, Kina og Suðurafrika á odda krevja, at teirra landbúnaðarvørur fáa betri atgongd til marknaðin í teimum ríku londunum. USA og Evropa hava ikki verið serliga sinnað til at finna eina semju um málið, men tað er júst her, at bjartskygni er farið at gera vart við seg, skrivar Aftenposten.

### Ov nógvar guðstænastur

Fleiri danskir biskupar mæla nú til at skerja talið á guðstænastum í teimum smáu kirkjunum, tí har ganga so fá fólk í kirkju.

Biskuparnir vísa á, at har lítið fólk býr, eru kirkjurnar hálvtómar hvønn sunudag, hóast prestur er, og tí halda teir, at tað hevði verið skilabetri at havt guðstænastu annan hvønn sunnudag. Tað hevði givið prestunum betri stundir til at boða gleðiboðskapin uttan fyri kirkjudyr, og so hevði tað eisini verið bíligari fyri kirkjuna, siga teir við Jyllandspostin.

Jan Lindhardt, sum er biskupur í Roskilde, sigur við blaðið, at tað er ikki serliga hugaligt hjá presti at prædika í einari hálvtómari kirkju. Tí heldur hann, at tað hevði verið rætt at havt guðstænastu annan hvønn sunnudag í teimum smáu kirkjunum. Aðrir biskupar so sum Karsten Nissen í Viborg, Niels Henrik Arendt í Haderslev og Kjeld Holm í Århus taka undir við honum.

### Trygdin í hásæti

Trygdin verður sett í hásæti, tá fyrrverandi amerikanski forsetin



# Venus fyri Sólini

*Seks tímar fyrrapartin í gjár var gongustjørnan Venus ímillum Jørðina og Sólina. Hetta er ikki hent síðani 1882, men kortini kunnu tey, sum ikki fingu eygað á prikkin á sólarflatuni í gjár, gleða seg um, at hetta fer at henda aftur í 2012*

*Mynd: Reuters*

# Andstøðan verður kúgað við píning og harðskapi

**Løgreglan í Iran virðir ikki altjóða mannarættindini, og alt verður gjørt fyri at halda andstøðuni niðri**

IRAN
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Fólk verða tikin og sett føst, sjálvt um tey eru ósek, og í fongslunum verða fleiri teirra pínd. Summi sita einsamøll í klivanum í langa tíð.

Hetta eru nakrar av ákærunum, sum mannarættindafelagsskapurin Human Rights Watch hevur í einari nýggjari frágreiðing um mannarættindini í Iran. Í teirri drúgvu frágreiðingini kemur felagsskapurin til ta niðurstøðu, at mannarættindini hava ikki verið so lítið vird í Iran, síðani tann nýskipanarhugaði Mohammad Khatami varð valdur til forseta fyri sjey árum síðani. Víst verður á, at hóast ES hevur lagt trýst á iransku myndugleikarnar fyri at fáa teir at halda altjóða reglurnar, er eingin bati hendur.

Human Rights Watch hevur tosað við fleiri fólk, sum hava sitið fangar í Iran. Teirra millum eru tíðindafólk, rithøvundar og studentar, sum hava verið sett føst og illa viðfarin, tí tey høvdu eina aðra politiska áskoðan enn tað ráðandi prestastýrið. Í fleiri førum nýttu myndugleikarnir píning og annan harðskap fyri at fáa tey tiknu at avdúka tað, tey vistu um ta politisku andstøðuna.

Sambært iranskari lóg er tað bannað at pína fangar ella at nýta annan harðskap ímóti teimum, men Human Rights Watch sigur, at myndugleikarnir leggja lítið í lógina. Tvørturímóti eru løgreglan og trygdartænastan teir ringastu at bróta lógina.

Human Rights Watch heldur, at tann stóri valsigurin hjá Mohammad Khatami í 1997 var óbeinleiðis byrjanin til harðskapin ímóti andstøðingunum. Tað vóru serliga tey ungu og nýskipanarhugaðu, sum stuðlaðu Khatami, og endamálið við harðskapinum er at kúga tey, so prestastýrið kann varðveita valdið, sigur Human Rights Watch.

Felagsskapurin finst samstundis at umheiminum og serliga ES fyri at venda tað deyva oyrað til.

# Vesturlendsk flogfeløg álopsmál hjá al-Qaeda

**Ein arabisk heimasíða vil vera við, at yvirgangsfelagsskapurin al-Qaeda umhugsar álop á vesturlendsk flogfeløg**

YVIRGANGUR
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Amerikonsk og onnur vesturlendsk flogfeløg eru nú álopsmál hjá al-Qaeda.

Ein arabisk heimasíða, sum verður hildin at hava gott samband við yvirgangsfelagsskapin hjá Osama bin Laden, skrivar, at felagsskapurin hevur valt sær fleiri álopsmál.

– Øll støð, har nógv fólk koma saman og herstøðir eru komandi álopsmál. Men serliga amerikonsk og onnur vesturlendsk flogfeløg kunnu rokna við álopi í næstu framtíð, stendur á heimasíðuni.

Samstundis verða muslimar bidnir um at halda seg burtur frá álopsmálunum.

ítróttur

Nr. 107 • mikudagur • 9. juni 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

# Lagt er upp til kanón kappróðrarár



*Áhugin tykis stórur, og í nógvum av bólkunum bendi fyrsti róðurin á, at talan verður um framúr spennandi kappróðrarár*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Í fleiri kappingum á Norðoyastevnu var tað tættari, enn tað ofta hevur verið, og tað vóru ikki bara tveir bátar, sum stríddust um sigrarnar**

NORÐOYASTEVNU KAPPRÓÐUR
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Um fyrsti FM kappróðurin verður nýttur sum grundarlag at meta vánirnar fyri nýggja kappingarárinum út frá - og tað er sjálvsagt tað besta grundarlagið av øllum - so kann ikki sigast annað, enn at alt bendir á, at 2004 kappróðrarárið fer at verða ógvuliga tætt og harvið spennandi.

Nógvu tey undanfarnu árini hevur tað á Norðoyastevnu verið soleiðis, at ein og ofta fleiri vinnararar hava verið ógvuliga sannførandi. Tað hevur verið upplagt at tosa um uppvísningsróður.

Á Norðoyastevnu bilti róðrunum einki. Men talan var ongantíð um uppvísningsróður, um tað hugtakið verður skilt soleiðis, at fremsti báturin er eina og fleiri bátslongdir frammanfyri kappingarneytarnar. Tað er ofta komið fyri í fyrstu FM kappingini í Klaksvík, at onkur vinnari hevur verið tríggjar bátslongdir og meiri enn tað undan teimum næstu.

### Eingin meistari fremstur

Merkisvert var tað eisini á Norðoyastevnu, at eingin av bátunum, sum var bestur í fjør, vann hesa ferð. Í fjør var Sílið meistari í dreingjakappingini. Gongurólvur var meistari í kappingini hjá kvinnum, og Drekin var bestur í gentukappingini. Smyril vann FM í kappingini millum 6-mannaførini við monnum, Ørvur var besta 8-mannafarið, og Eysturoyingurin var stinnastur av 10-mannaførunum.

Leygardagin vann Sílið gentukappingina, og Jarnbardur var bestur í kappingini millum 6-mannafør við kvinnum. Besti dreingjabáturin var nýggi Spógvin, sum Kappróðrarfelagið NSÍ eigur. Sundabáturin, sum var nýggjur bátur í fjør, og sum teir í Norðdepli og Hvannasundi eiga, vann fyri fyrstu ferð kappingina millum 6-mannafør við monnum. Argjabáturin var fyrstur á mál í kappingini millum 8-mannafør, og í spennandi kappingini millum 10-mannaførini var Havnarbáturin fremstur.

Í øðrum ítróttargreinum verður tað lagt til merkis, tá ið FM vinnarin ikki stendur seg væl í næstu kappingini. Tað verður eisini lagt til merkis í kappróðrinum, tá ið meistarin ikki stendur seg væl. Orsøkirnar til at bátar standa seg verri eitt ár og betri eitt annað ár, kunnu vera tær somu í kappróðrinum, sum tær eru tað í øðrum ítróttargreinum. Eitt nú kann manningin ella partar av henni vera farin í annan bát, og tað kann sjálvandi eisini koma fyri, at venjingarstøðan er betri ella verri, enn hon var undanfarna árið.

### Trý feløg í høvuðsstaðnum

Í fjør var Havnar Róðrarfelag rættuliga sannførandi. Tey vunnu fýra FM heiti. Hóast fyrsti FM róðurin ikki boðaði frá, at tað skal ganga so eftir ánni hjá største felagnum í ár, sum tað gjørdi í fjør, so er møguleiki fyri tí. Havnar Róðarfelag vann tvær kappingar. Spildurnýggja Sílið vann genturóðurin, og Havnarbáturin var fremstur í kappingini millum 10-mannaførini. Knørrafelagið vann kvinnukappingina við Jarnbardi, og Argjabáturin syrgdi fyri fjórða sigrinum til høvuðsstaðin.

Fyri kappróðurin og áhugan kring landið sum heild var tað rættuliga hugaligt, at Sundabáturin úr Norðdepli og Hvannasundi vann kappingina millum 6-mannaførini við monnum. Harvið varð staðfest, at tað enn ber til hjá plássi, har traditiónirnar fyri kappróðri hava verið burtur í mong ár, at bjóða av og vinna.

Spildurnýggi dreingjabáturin hjá Kappróðrarfelagnum NSÍ, Spógvin, var fyrsti báturin, sum í hesum kappingarárinum fekk sjey stig. Hann var største róðurin av øllum.

Longu nú leygardagin verður næsti FM kappróðurin. Hann verður á Eystanstevnuni, sum verður í Runavík. Tá verður uppgávan hjá vinnarunum í Klaksvík at verja fremsta plássið á støðutalvuni, og hjá teimum, sum sótu eftir við kensluni av, at tað á Norðoysastevnu ikki gekk, sum tey høvdu ætlað, og sum tey kanska høvdu væntað, at tað fór at ganga, verður nýggjur møguleiki at vinna stig, steyp og heiður. Gongdin og úrslitini leygardagin bendu á, at tað er lagt upp til eitt kanón spennnandi róðrarár.

## Kappróðrar støður, FM

**5-mannafør, dreingir**

| | | Stig |
|---|---|---|
| 1 | Spógvin | 7 |
| 2 | Blikur | 5 |
| 3 | Fípan Fagra | 4 |
| 4 | Havfrúgvin | 3 |
| 5 | Sílið | 2 |
| 6 | Tekla | 1 |

**6-mannafør, kvinnur**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Jarnbardur | 7 |
| 2 | Páll Fangi | 5 |
| 3 | Lómur | 4 |
| 4 | Víkingur | 3 |
| 5 | Gongurólvur | 2 |
| 6 | Sølmundur | 1 |

**5-mannafør, gentur**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Sílið | 7 |
| 2 | Havfrúgvin | 5 |
| 3 | Blikur | 4 |
| 4 | Firvaldur | 3 |
| 5 | Fípan Fagra | 2 |
| 6 | Frúgvin | 1 |

**6-mannafør, menn**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Sundabáturin | 7 |
| 2 | Gongurólvur | 5 |
| 3 | Strálan | 4 |
| 4 | Jarnbardur | 3 |
| 5 | Víkingur | 2 |
| 6 | Lómur | 1 |

**8-mannafør**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Argjabáturin | 7 |
| 2 | Nevið Reyða | 5 |
| 3 | Kvívíkingur | 4 |
| 4 | Ørvur | 3 |
| 5 | Knørrur | 2 |

**10-mannafør**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Havnarbáturin | 7 |
| 2 | Nólsoyingurin | 5 |
| 3 | Vestmenningur | 4 |
| 4 | Vágbingur | 3 |
| 5 | Eysturoyingur | 2 |
| 6 | Hoyvíkingur | 1 |